Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Sólvit E. Nolsø, løgtingsmaður

Svarari: Høgni Hoydal, landsstýrismaður í uttanríkis- og vinnumálum

Evni: Uppboðssøla av húsum

Spurningar:

1. Hvør lóg skipar uppboðssølu av húsum í Føroyum?
2. Hvørjum reglum skulu húsasølufólk fylgja, og er nakað, sum sigur, at øll boð, sum koma á ognir, skulu gerast almenn?
3. Ætlar landsstýrismaðurin at gera tað so, at afturlatnar uppboðssølur av ognum eisini verður ein møguleiki?

Viðmerkingar:

Tað gerst alsamt torførari hjá fólki at útvega sær bústað í Føroyum. Fleiri hava víst á tað sum eina høvuðsorsøk til, at fleiri nú aftur leita sær av landinum.
Trupulleikarnir á bústaðarmarknaðinum eru sjálvandi samansettir, og tað er eingin einføld ella einsíðug loysn.
Eitt, ið vit áttu at hugt nærri at, eru almennu uppboðssølurnar á bústaðarmarknaðinum.

Almennar uppboðssølur hava tað við sær, at fólk eru útsett fyri at spenna boðan meira enn gott er, tí tey fleiri ferðir skulu taka støðu til nýggj boð, sum koma uppá húsini, tey eru áhugað í. Almenn boð kunnu eisini hava við sær, at fólk, sum bjóða uppá eini sethús, skulu í eina almenna kapping við fólk, sum hava nóg mikið av tiltakspeningi at keypa frítíðarhús fyri.
Almennar uppboðssølur gera eisini, at hús, sum frammanundan eru dýr, ofta dýrka meir enn helst gott er, tí eitt prískríggj stendst av støðuni.

Samanumtikið kann sigast, at húsamarknaðurin í Føroyum er fyrst og fremst til fyrimunar fyri seljarar. Talan skal sjálvandi ikki verða um at avtaka marknaðin, men heldur skumpa hann eitt sindur longri móti miðuni, so bæði keyparar og seljarar kunnu kenna sæl væl til rættis á honum.

Á Løgtingi, 13. september 2024

Sólvit E. Nolsø